NVD *Rit*

SERRITGERÐ
Thesis

TØKNIFRÁGREIÐING
Technical Report

UNDIRVÍSINGARTILFAR
Teaching Material

UPPRIT
Notes

# Túrfrágreiðing

## Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka

## 3.– 10. september 2008

*Cruise report: Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*

*3-10 September 2008*


Eyðfinn Magnussen






NVD*Rit* 2008:06



NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN
Faculty of Science and Technology
FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
University of the Faroe Islands

Heiti / Title

***Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka***

**3.- 10. september 2008**

*Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*

*3-10th September 2008*

Høvundur / Author **Eyðfinn Magnussen**

Ritslag / Report Type Tøknifrágreiðing/Technical Report

***NVD*Rit** 2008:06
© Náttúruvísindadeildin og høvundurin

Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)
Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)
☎ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
## Yvirlitstroling-Føroyabanki. Túrur nr. 0868
### Tíðarskeið 3.-10. september 2008

**Fólk frá FRS:** Regin Kristiansen, Petur Steingrund og Jógvan á Steig (praktikantur).
**Fólk frá Fróðskaparsetrinum**: Hannipaula Olsen, Helga Bára Mohr Vang, Eirikur Danielsen, Tóra Winther Reinert og Eyðfinn Magnussen.

**Ábyrgd:** Eyðfinn Magnussen, Fróðskaparsetur Føroya.

**Endamál**: Hetta var tann triði og seinasti túrurin av heyst-yvirlitstrolingunum í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Vekt, tal og longdarbýti varð skrásett fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd á túrinum. Eisini vóru gjørdar magakanningar av toski, hýsu og upsa. Umframt at fiska, vóru mátingar eisini gjørdar av salti, hita og plankton á Bankanum.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum og við vanligum grunni. Breitlarnir vóru 60 m og 120 m, Steinhamns lemmar, Seastar hitamátari, Sea-Bird CTD og WP2 glúpur.

**Um túrin:** Farið varð av Havnini 3. september kl. 22.00. Trolið var koyrt út fyrstu ferð 4. september kl. 07.25. Seinasta CTD-støðin varð tikin 8. september kl. 14.32. Alla støðir vórðu tiknar. Í sýnishondbókini verður miðað eftir at taka tilsamans 1200 nytrur av toski, hýsu og upsa; 400 av hvørjum. Av tí at ov lítið var at fáa, var hetta bert møguligt fyri hýsu. Av toski vórðu tiknar 109 nytrur og av upsa 84 nytrur.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Magarnir vórðu kannaðir umborð. Hitamátingarnar á trolinum og úrslitini frá Imponatorskipanini verða liðug rættað skjótast møguligt og løgd í databasuna.

## Fyribilsúrslit




***Mynd x1****: Miðalhitin við botnin á Føroyabanka 4.- 8. september 2008. Hitin er miðalvirðið fyri hvørt tov.*




***Mynd 2****: Miðalhitin ± standardfrávik (S) við botnin á Føroyabanka um várið (heila linjan) og heystið (brotna linjan) árini 1997-2008. Bert mátingar grynri enn 150 m eru tiknar við.*

| FISKANAVN | Samlað veiða (kg) | | Munur (%) | Tal av prøvum | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2007 | 2008 | | Longdar mátað | Stak vektir | Nytrar | Magar |
| HAVMÚS | 1.368 | 2.306 | 69 | 213 | 200 | | |
| HÝSA | 2.661 | 1.707 | -36 | 1.194 | 1149 | 402 | 74 |
| GULLLAKSUR | 1.574 | 1.335 | -15 | 227 | 225 | | |
| SVARTKJAFTUR | 142 | 1.223 | 761 | 459 | 359 | | |
| KNURRHANI | 7 | 877 | 12424 | 180 | 178 | | |
| TOSKUR | 687 | 674 | -2 | 109 | 109 | 109 | 50 |
| LOLIGO | 1.307 | 534 | -59 | 447 | 180 | | |
| KJAFTSV. KONGAFI. | 226 | 349 | 54 | 73 | 71 | | |
| UPSI | 575 | 293 | -49 | 84 | 84 | 84 | 32 |
| SILVURMURTUR | 5 | 161 | 3123 | 59 | 38 | | |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 33 | 154 | 366 | 14 | 13 | | |
| LONGA | 99 | 142 | 44 | 42 | 42 | | |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 315 | 96 | -69 | 291 | 185 | | |
| GLÝSUFISKUR | 73 | 80 | 10 | 1.296 | 618 | | |
| KALVI | 12 | 76 | 530 | 7 | 7 | | |
| TUNGA | 35 | 41 | 17 | 45 | 45 | | |
| SANDSPRØKA | 5 | 36 | 613 | 39 | 33 | | |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 0 | 30 | | 3 | 3 | | |
| STÓRI KONGAFISKUR | 18 | 24 | 32 | 17 | 16 | | |
| BROSMA | 4 | 21 | 434 | 13 | 13 | | |
| LÍTLA BROSMA | 0 | 19 | | 10 | 10 | | |
| HAVTASKA | 30 | 17 | -43 | 3 | 3 | | |
| BLÁLONGA | 24 | 11 | -54 | 5 | 5 | | |
| LÝSINGUR | 3 | 9 | 205 | 3 | 3 | | |
| GLASKVOYSA | 0.2 | 7 | 3.617 | 23 | 23 | | |
| TRANTKONGAFIS. | 11 | 6 | -42 | 6 | 5 | | |
| SKØTA | 0 | 5 | | 2 | 2 | | |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 0 | 5 | | 5 | 4 | | |
| ROGNKELSI | 0 | 5 | | 1 | 1 | | |
| STINGLAKSUR | 14 | 4 | -69 | 2 | 2 | | |
| BLÁRIDDARI | 0.7 | 4 | 506 | 12 | 11 | | |
| MORA | 0 | 3 | | 1 | 1 | | |
| SVARTFISKUR | 87 | 2 | -97 | 1 | 1 | | |
| BRAMAFISKUR | 0 | 2 | | 2 | 2 | | |
| SILVURKALVI | 0 | 2 | | 1 | 1 | | |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 2 | 1 | -25 | 221 | 2 | | |
| HVASSASPREK | 0 | 1 | | 1 | 1 | | |
| ROSSAMAKRELUR | 2 | 1 | -50 | 1 | 1 | | |
| GESTFISKUR | 0 | 0.3 | | 1 | 1 | | |
| JÁKUPSSKEL | 0 | 0.2 | | 2 | 2 | | |
| KIKARAFISKUR | 5 | 0.1 | -98 | 1 | 1 | | |
| LAKSSILD | 0 | 0.06 | | 6 | 0 | | |
| NEBBASILD | 0.02 | 0.0 | 20 | 13 | 1 | | |
| SEKSTÁKNUHÁVUR | 96 | - | - | - | - | | |
| LÁLLA | 14 | - | - | - | - | | |
| REYÐSPRØKA | 3 | - | - | - | - | | |
| HVASSHVOYSA | 3 | - | - | - | - | | |
| TRANTLANGASPORL | 3 | - | - | - | - | | |
| KLINGRUSKØTA | 2 | - | - | - | - | | |
| **Tilsamans** | **9.446** | **10.265** | **+9%** | **5.135** | **3.651** | **595** | **156** |

***Talva 1:*** *Samlaða veiðan á Føroyabankatúrinum 4.-8. september 2008. Eisini verður samanborið við veiðuna heysttúrin árið fyri.*

**Fiskasløg:** Fingin vórðu íalt 43 ymisk fiskasløg á túrinum (*Talva 1*). Hetta eru 6 sløg fleiri enn á heysti 2007, tá vit fingu 37 ymisk fiskasløg. Í 2006 vórðu fingin 30 fiskasløg. Talið av fiskasløgum, sum verða fingin á yvirlitstrolingunum á Bankanum, hevur verið rættiliga støðugt; 33 til 34 ymisk sløg, men tey seinru árini hevur talið av fiskasløgum verið alsamt vaksandi.

**Veiðan:** Samlaða veiðan hendan túrin var 10.265 kg. Hetta er 9 % meira enn fyri einum ári síðani, tá samlaða veiðan var 9.446 kg (*Talva 1*) men einans 39% av samlaðu veiðuni í 2004, sum var 26.366 kg. Veiðan av flestu fiskasløgunum var hægri henda túrin enn í fjør: Av teimum 43 fiskasløgunum, sum vórðu fingin á túrinum, var veiðan hægri fyri 28 av sløgunum. Fyri 15 av fiskasløgunum varð minni fingið hendan túrin, samanborið við heysttúrin í fjør. Á *myndunum 1 – 6* verður greitt frá veiðuni av toski, hýsu og upsa, og hvussu væl í holdum hesi fiskasløgini vóru.

**Toskur:** Tilsamans vóru fingin 674 kg (109 fiskar), av toski á Føroyabanka hendan túrin móti 687 kg (147 toskar) í 2007. Hetta er ein minking av veiðuni í vekt uppá 2 % samanborið við í fjør. *Mynd 1* vísir miðalkonditiónsfaktorin á toskinum. Konditiónsfaktorurin sigur okkum, hvussu feitur fiskurin er. Miðalkonditiónsfaktorurin hendan túrin var 1,08, sum er 4% hægri enn í fjør, tá konditiónsfaktorurin var 1,04. *Mynd 2* vísir miðalveiðuna av toski í heyst-yvirlitstrolingunum á Føroyabanka árini 1991 og frameftir. Hendan túrin var miðalveiðan 23 kg pr. fiskitíma. Hetta eru 2% minni enn árið fyri, tá veiðan var 24 kg fyri hvønn fiskitíma. Samanborið við onnur ár var veiðan tó lítil. Í 2002 var miðalveiðan 249 kg pr. fiskitíma.




***Mynd 1**: Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá toski á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1992-2008.*




***Mynd 2**: Miðalveiðan av toski (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991-2008.*

**Hýsa:** Í alt vórðu fingin 1.707 kg av hýsu (*Talva 1*). Hetta er ein minking upp á 36% samanborið við árið fyri. Miðalkonditiónsfaktorurin fyri samlaðu hýsuna var 1,04, sum er 1.3 % hægri enn í fjør (*Mynd 4*). *Mynd 3* vísir miðalveiðuna av hýsu, fingin á heyst-yvirlitstrolingini síðani 1991. Her sæst, at veiðan øll árini til 2002 var støðugt vaksandi. Í 2002 var veiðan av hýsu 1.210 kg pr. fiskitíma. Men eftir hetta hevur veiðan verið støðugt minkandi. Soleiðis var eisini í ár. Miðalveiðan av hýsu hendan túrin var einans 59 kg pr. fiskitíma, móti 92 kg í 2007. Hetta er ein minking uppá 36%, samanborið við 2007 og einans 59% av veiðuni í 2006.




***Mynd 3**: Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá hýsu  á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1996-2008.*




***Mynd 4**: Miðalveiðan av hýsu (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991–2008.*

**Upsi:** Samlaða veiðan av upsa var 293 kg (*Talva1*). Hetta er bert 49% av veiðuni samanborið við upsaveiðuna í fjør. Miðalkonditiónsfaktorurin á upsanum var 0,97, sum er 4% hægri enn fyri einum ári síðani. Á *mynd 6* er víst miðalveiðan av upsa á heyst-yvirlitstrolingunum á Føroyabanka frá árunum 1991 og frameftir. Hendan túrin var miðalveiðan 10 kg pr. tóv, sum bert er helvtin av veiðuni fyri einum ári síðani (20 kg pr. tóv).




***Mynd 5**: Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá upsa á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1996 til 2008.*




***Mynd 6**: Miðalveiðan av upsa (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991-2008.*

**Magakanningar**

**Toskur**: 50 toskamagar vórðu kannaðir. Høvuðsføðin hjá toski vóru krabbadýr (svimjikrabbar, gággukrabbar og Galathea/Munida). Best umboðaðu fiskarnir vóru smáir glýsufiskar. Eitt lítið sindur av høgguslokki var eisini. So at siga eingin nebbasild varð funnin í magunum. Mest vanliga føðin hjá toskinum á Føroyabanka plagar annars at vera nebbasild og høgguslokkur.

**Hýsa**: 74 hýsumagar vórðu kannaðir. Føðin hjá hýsuni var ein blandingur av slangustjørnum, skeljum, bustmaðkum, gággukrabbum og Galathea/Munida.

**Upsi**: 32 upsamagar vórðu kannaðir. Vanligasta føðin hjá upsanum var laksasild, krill og veingjapíkur.

Tórshavn 23. september 2008

Eyðfinn Magnussen_____________________